## Knústi bil sundur í Skopun

Helst var tað ein illstøða millum tveir ungar menn, ið førdi við sær, at ein 17 ára gamal skopuningur knústi 5 rútar í einum bili. Tað er ikki heilt vist, at tað er hesin 17 ára gamli hevur gjørt missbrotið, men løgreglan hevur ein stóran illgruna um hetta, tí tað skilst at tað er ein illstøða millum eigaran av bilinum og 17 ára gamla drongin. 17 ára gamli drongurin verður í øllum førum mettur at hava gjørt herverk. Eisini onnur smá herverk vóru um vikuskiftið.



## Fólk vilja búgva heima sum longst

Fólk vilja búgva í egnum heimi sum longst, tá tey gerast gomul, sigur ein kanning, sum millum annað er gjørd í Føroyum. Føroya Kommunufelag og Nærverkið eru við í verkætlanini "Okkara lív sum eldri" saman við kommunum í útjaðarum í Norður-evropa. Endamálið er at betra umstøðurnar hjá okkum, sum verða gomul í framtíðini. Hetta er seinna verkætlanin, sum eitur "Okkara lív sum eldri". Tann fyrra var í 2006, og nú skulu tilmælini, sum spurdust burturúr tá, setast í verk. Millum annað vilja tey, sum tá vórðu spurd, búgva heima sum longst, tá tey gerast eldri. Verkætlanin "Okkara lív sum eldri 2" endar í 2011 og kostar slakar 15 milliónir krónur. Okkurt um helvtin av pengunum kemur frá ES, og føroyski parturin er 1,3 millión krónur.

*Kelda www.kringvarp.fo*




*Tá Mia var lítil, kendi hon eina gentu, sum ofta hevði blátt neglalakk. Tað helt Mia vera so frúktiliga pent, so tað teknaði hon í dagbókina*




*Her hevur Mia teknað abba sín í Havn í lítlu dagbókina*

# Mia og abbin teknað dagbók

**Tá lítla Mia og abbin hugnaðu sær saman, sat Mia altíð og teknaði. Nú hevur abbin givið tekningarnar hjá Miu út í bók**

BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Nógvir abbar goyma onkrar tekningar hjá abbabørnunum. Tað ger abbi Miu úr Havn Thomas Michael Smith eisini. Serliga væl goymir hann eina lítla bók, sum Mia teknaði í, tá hon var fýra ára gomul. Í dag er Mia 15 ár, men tekningarnar eru til enn, og nú hevur abbi Miu gjørt tær til eina bók, sum eitur *Miusa dagbók.*

### Prát og tekingar

»Mamma og pápi Miu búðu í Danmark, tá tey fingu hana. Og so var tað, at mamman skuldi skriva tað, sum hon hevði lært, meðan hon hevði gingið í skúla, á fleiri pappír, og fáa prógv frá skúlanum.

Tá var tað gott, at Mia átti ommu og abba í Havn, tí so kom hon bara heim til tey, so mamma fekk betri frið at skriva til skúlan«

Soleiðis byrjar *Miusa dagbók.* Tí tá Mia kom til ommuna og abban í Havn at ferðast, hevði hon sína egnu lítlu dagbók við sær - eina fína, lítla gula bók við tveimum fittum einglum á permuni. Hesa bókina ætlaði hon at tekna í hvønn dag, nú hon skuldi ferðast í Føroyum í 14 dagar.

Mia byrjaði longu at tekna í bókina, meðan hon sat í flogfarinum á veg til Føroyar. Hon teknaði eitt fínt flogfar og niðriundir skrivaði Mia, "Nú flúgva vit". Og soleiðis helt Mia á at tekna alt, sum hon sá og upplivdi. Serliga tá hon var saman við abbanum, teknaði Mia nógv, tí hann hevði so góða tíð at ansa eftir Miu og dugdi eisini sjálvur væl at tekna.

- Tað hugnaligasta var, at sita og práta, meðan vit teknaðu. So prátaðu vit um, tað, Mia teknaði ella teknaðu tað, vit prátaðu um, fortelur Thomas.



*Abbi Miu, Thomas Michael Smith, goymir lítlu dagbókina hjá Miu sum reyðagull*




### Goymast sum reyðagull

Dagarnir saman við Miu gingu skjótt, men tað var ikki tí, tað hendi so øgiliga nógv allatíðina, fortelur abbin, Thomas Michael Smith.

- Eg haldi vit hava lyndi til at gloyma, hvussu hugnaligt tað kann vera bara at vera saman og gera heilt vanlig ting saman í gerandisdegnum. Tí helt eg eisini, at vit skuldu royna at goyma hesar løturnar væl og virðiliga, sigur Thomas og leggur afturat, at tí verður lítla dagbókin hjá Miu eisini goymd sum reyðagull.

Og nú kemur dagbókin hjá Miu so út sum bók, so onnur børn eisini sleppa at síggja og lesa um hesar dagarnar. Bókin er gjørd soleiðis, at øll børn kunnu vera við - eisini tey, sum ikki duga at lesa, tí tekningarnar hjá Miu og abbanum fortelja eina rúgvu av søgum.

Lítla Mia helt á at tekna, eftir at ferðin heima í Føroyum var liðug. Tí kann tað væl hugsast, at abbi Miu fer at geva eina aðra bók út seinni við meir tekingum hjá Miu.

## Heini Olsen minnist og ørminnist

**Byrjanin av mongu ferðunum hjá ævintýraranum hjá Heina Olsen er komin út í bókini *Meg minnist - og ørminnist***

BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Heini Olsen hevur strokið víða í sínum lívi og hevur stóran part av ævini virkað millum fólk, sum eru okkum ógvuliga fremmand. Hann hevur sæð og hoyrt mangt forvitnisligt og skemtiligt.

Nú hevur hann í hyggju at taka okkum við sær og endurliva sínar mongu ferðir kring knøttin í orðum og myndum.

*Meg minnist - og ørminnist* er fyrsta bind av fleiri um hesar ferðir. Heini Olsen byrjar her við barna- og ungdómsárunum í Vestmanna og á Tvøroyri, áðrenn hann leggur til brots.

### Lívsins søga

Í bókini greiðir Heini Olsen frá, at longu sum smádrongur fekst hann við at penta søgur saman í hugaheiminum, sum tó ongantíð vórðu festar á blað. Foreldrini hildu bæði, at hóast fátæksligt var til verðsligt ríkidømi, mundi lívið í sjálvum sær vera besta søgan, skrivast kundi, og sum árini gingu, kom Heini á teirra orð. - Eg gjørdist sannførdur um, at neyvan mundi vera frægari tilfar at hugsa sær til enn tað, sum í minninum liggur tøkt at finna fram. Tað veri seg úr teirri døkku myndarøðini, ið, sum frá líður, tíbetur hevur lyndi at kámast og kanska best hevði verið gloymd, ella heldur úr teirri bjørtu, ógloymandi røð av glitrandi gripum av løttum og tungum, men hugtakandi hendingum, sum lívið í sjálvum sær kann fevna um, skrivar Heini Olsen í nýggju bókini.

*Meg minnist - og ørminnist* verður løgd fram hóskvøldið klokkan 19 í Miðlahúsinum í Vágsbotni




*Heini Olsen byrjar frásøgnina í barna- og ungdómsárunum, áðrenn hann leggur til brots út í heim*